# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 15. apríl hava Ebba og Olaf Petersen, Vági, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

### Silvurbrúdleyp
24. apríl hava hjúnini Fía & Petur í Túni, Toftir, silvurbrúdleyp. Vælkomst verður á Svangaskarði, leygardagin 30 apríl frá kl. 17.00 Hjartaliga vælkomin.
*Fía & Petur*

### Brúdleyp
Mikudagin 27. apríl giftast í Bangkok Kanitsara Chawna úr Thailandi og Ernst Magnussen av Nesi. Tey hava í hesum sambandi postadressu á Nesvegi 67, 655 Nes el. ernstmagnussen@gmail.com

### Brúdleyp
Leygardagin 11.juni 2011 giftast Malan Ludvig, Tórshavn og Dávur Brøðraberg, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, og nátturði verður í Sjóndeplinum í Tórshavn frá kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 251008 (Malan) ella á tlf. 215060 (Dávur) innan 15.mai 2011.

### 80 ára føðingardagur
Fríggjadagin 22. apríl fyllir Dana Hammer, Nes, 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 23. apríl í Missiónshúsinum Thabor á Toftum frá kl. 12 - 17, øll eru hjartaliga vælkomin.

### 50 og 55 ára føðingardagar
Mariane Haraldsen og Fróði Ólason Olsen, Viðargøta 50, Argir, fylla 50 og 55 ár. Føðingardagarnir vera hildnir í Róðrarneystinum 14.5 kl 18. Tað hevði glett okkum at sæð skyldfólk, vinir og kenningar. Vinarliga sigi frá á tlf. 311299 innan 1.5.11



### 80 ára føðingardagur
Skírishósdag 21. apríl verður Martha Poulsen, Tórshavn, 80 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshølinum, J. H. Schrødersgøta 9 millum kl 17 og 21, har øll eru hjartaliga vælkomin



Leygardagin 7. mai halda vit, Valborg og Kári Kjelnæs, Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Lorvík ll. 19.00 Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá innan hósdagin 28. apríl á tlf. 455644 ella tlf. 256000
ella á *kkksls@olivant.fo*



### Brúdleyp
Leygardagin 30.april 2011 giftast Hanna Hanusardóttir Hansen, Fuglafjørður og Ingi Elmelund Petersen, Tórshavn. Vígsla og móttøka verður úti á skúlaheiminum við Marknagilsvegin kl.09.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# Heilsanir



**Góði, fitti Høgni!**
Hjartaliga tillukku við 21 ára føðingardegnum, ið var í gjár. Alt tað besta víðari við lærutíðini. Jesus pápi signi lívsleið tína. Tey allarbesta ynski frá okkum her norðuri.
**Abbi og omma**



## Takk

Hjartaliga takk vit øllum, sum mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum 18. desember 2010.

Takk fyri allar uppringingarnar, blómur og flógv lógvatøk.

Takk til familjuna, okkara nærmastu og til tykkum mongu longur úti, sum altíð eru nær, tá ið ástendur.

Ein serlig tøkk til starvsfólkini á Hotel Vágum fyri teir dagarnar, vit vóru har í sambandi við gullbrúdleypið og har tit rættuliga forkelaðu okkum.

*Heilsan*
**Jóhanna og Henry Jarnskor**
*Strendur*

INPACT

## BÓKHALDARI

Fyri ein av kundum okkara í Suðuroy verður hervið søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber. Talan er um 1/2 ella 3/4 tíðarstarv.

**Høvuðsuppgávan:**
Tann, sum settur verður í starv kemur at hava ábyrgdina av bókhaldinum. Virksemið umfatar rakstur av fiskiskipum. Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir avrokning av hýrum. Arbeitt verður við bókhaldsskipanini Lundin, herundir avrokningarskipanini til hýruavrokning.

**Førleikakrøv:**
Ongar serligar treytir verða settar til útbúgving, men umsøkjarar við hesum royndum hava fyrimun :
- Royndir at arbeiða við bókhaldsskipanini Lundanum og avrokningarskipanini
- Góðan kunnleika í nýtslu av kunningartøkni
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanartreytir:**
Starvstreytirnar verða ásettar eftir avtalu millum tann, sum verður settur og leiðsluna.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
Stílað: Fróði Sivertsen
Postrúm 191
FO-110 Tórshavn
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. apríl 2011.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Fróða Sivertsen, statsaut. revisor, Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT. tlf. nr. 554725 ella teldupostadr.: fs@inpact.fo